# Deja Vu spælir tvær konsertir í London



**Í sambandi við at Deja Vu luttekur á GBOB finaluni í London, hevur bólkurin tryggjað sær enn eina konsert í bretska høvuðsstaðnum, konsertin verður á Betsy Trotwood.**

KONSERT

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Týsdagin í komandi viku brestu Deja Vu saman við 25 øðrum bólkum í GBOB finaluni í legendariska spælistaðnum The London Astoria. Men nú Deja Vu er í London, hevur bólkurin eisini fingið í lag eina spæling í Betsey Trotwood, ið er eitt spælistað, ið leggur seg eftir at bjóða fram tónleik, ið ikki er heftur at stórum útgávufeløgum. Har er tónleikur nærum hvørt kvøld. Deja Vu fer á pallin hóskvøldið 14. desember, teir eru høvuðsnavn hetta kvøldið og talan er um eina sonevnda sýnisgluggakonsert, hetta merkir, at umframt vanligu gjaldandi áskoðararnar eru eisini innbodnir gestir, ið koma fyri at hyggja at Deja Vu, talan er ofta um plátufeløg, management feløg, festivalar, fyriskiparar og onnur úr tónleika ídnaðinum. Tað er íslendska Anna Hildur Hildibrandsdóttir, ið hevur fingið hetta í lag.

Anna Hildur Hildibrandsdóttir er umboðskvinnan hjá Iceland Airwaves í London og skipaði fyrr í heyst fyri tónleikaliga partinum av Funky Faroe Islands ráðstevnuni.

Konsertin verður í Betsey Trotwood, 56 Farringdon Rd., Deja Vu fer á pallin um kl. 22, men longu kl. 19.15 fer fyrsti upphitingarbólkurin á pallin. Tveir bólkar hita upp hetta kvøldið My Pretty Broken og Aaron King.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, partvís kavi og hitin milum 2 og 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin upp í hvassan vind av útnyrðingi, men seinnapartin minkar hann vindin niður í lot av vestri. Yvirhøvur turt og hitin um 4 stig. Um kvøldið veksur hann vindin upp í skrið av landsynningi og regn. Lýggjari.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin skrið ella stormur av suðri og regn, seinnapartin hvassur vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 7 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -8 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | -3 |
| Ammassalik | -10 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 9 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 20 |
| Athen | -- |
| Malta | 20 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | -- |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 13 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 963 hPa. vestasn fyri Hebridurnar fer í landnyrðing. Vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft framvegis móti Føroyum.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Suður-Noreg fer norðureftir og grynnist. Lágtrýstið við Ermasund fer móti Norðsjónum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 4/12 kl. $06^{00}$– 5/12. $06^{00}$. Hitin í gjár: 7,6°
Minsti hiti máldur í desember: - 10,5° - Mesti hiti máldur í desember: 13,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/10 kl. $06^{00}$– 18/10 kl. $06^{00}$ Avfallið higartil í desember: 0,0 mm





Sosialurin





### VESTFALLSKYRRINDI

2. desember — Mánin næstur jørðini
5. desember — Fullmáni
12. desember — Seinna kvarter
13. desember — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. Des | 08.18 | 20.45 | 07.18 | 19.45 | 07.33 | 20.00 | 10.18 | 22.45 | 11.18 | 23.45 | 06.33 | 19.00 | 05.33 | 18.00 | 08.33 | 21.00 | 09.33 | 22.00 | 08.03 | 20.30 | 09.18 | 21.45 |
| 8. Des | 09.13 | 21.37 | 08.13 | 20.37 | 08.28 | 20.52 | 11.13 | 23.37 | - | 12.13 | 07.28 | 19.52 | 06.28 | 18.52 | 09.28 | 21.52 | 10.28 | 22.52 | 08.58 | 21.22 | 10.13 | 22.37 |
| 9. Des | 10.02 | 22.24 | 09.02 | 21.24 | 09.17 | 21.39 | - | 12.02 | 00.37 | 13.02 | 08.17 | 20.39 | 07.17 | 19.39 | 10.17 | 22.39 | 11.17 | 23.39 | 09.47 | 22.09 | 11.02 | 23.24 |
| 10. Des | 10.47 | 23.07 | 09.47 | 22.07 | 10.02 | 22.22 | 00.24 | 12.47 | 01.24 | 13.47 | 09.02 | 21.22 | 08.02 | 20.22 | 11.02 | 23.22 | - | 12.02 | 10.32 | 22.52 | 11.47 | - |
| 11. Des | 11.28 | - | 10.28 | 23.01 | 10.43 | 23.16 | 01.07 | 13.28 | 02.07 | 14.28 | 09.43 | 22.16 | 08.43 | 21.16 | 11.43 | - | 00.22 | 12.43 | 11.13 | 23.46 | 00.07 | 12.28 |